MARKAMÓTSNEVNDIN

Tórshavn 6. desember 2019

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Mál viðvíkjandi borgara undir 67 ár við diabetes

Markamótsnevndin hevur í november 2019 fingið mál frá Almannaverkinum, við skrivi dagfest 14. november 2019, viðvíkjandi borgara undir 67 ár, ið heilsuliga er merktur av lívslangari diabetessjúku og fylgisjúkum.

Sum upplýst hevur borgarin kroniska sjúku, har avleiðingarnar eru, at hann hevur fingið skaðar á heila og gøgn, sum gera at hann er at javnmeta við eitt 85 ára gamalt menniskja, enntá eitt menniskja á hesum aldurstigi við ringum førleikum. Borgarin er longu nú røktarkrevjandi og verður mett sannlíkt at gerast meira røktarkrevjandi næstu árini.

Nevnt verður t.d. í "status yvir heilsustøðuna" frá 15.10.19, undirskrivað av deildarlækna á Landssjúkrahúsinum, at hansara diabetiska nefropati (diabetisk nýrasjúka) nú er so mikið vánalig, at hon verður stigað til 4 stig, og soleiðis sum nefropatiin progredierar, fer borgarin innan nøkur fá ár at verða kandidatur til dialysu men læknafakliga verður hann kortini ikki mett egnaður til dialysu. Sagt verður, at borgarin eisini er hart "rakt kognitivt, og tað allarhelst kann tilskrivast fleiri tingum, men helst serliga vánaligu regulatiónina við nógvum tilburðum við hypoglykæmi og nógvum tilburðum við ketoacidosu (sýrueitran)".

Í journal eftir sjúkrarøktarfrøðing, dagfest 01.05.2019, verður sagt um røktartørvin, at sjúklingurin fær matin skornan niður og megnar at eta við hjálp ("guidan"), men hevur trupult við at fáa mat upp á bestikkið, tí hann sær so illa. Borgarin heldur seg heldur ikki reinan, men má hava hjálp til at fara á WC og hjálp til at vaska sær. Nevnt verður eisini, at sjúklingurin er koyristólsbrúkari og brúkar glíðibretti, tá hann verður flutt frá song til koyristól.

Í journal eftir ergoterapeut, dagfest 03.05.2019, verður sagt, at sjúklingurin hevur tørv á massivari hjálp til mest sum allar aktivitetir. Eitt nú kann sjúklingurin koma upp at standa við hjálp frá rollatori, men tekur ikki vekt á høgra bein, er flekterað í mjadnunum og er paniskt bangin fyri at detta.

Í nevnda skrivi frá Almannaverkinum heitir Almannaverkið á Markamótsnevndina um at taka støðu til markamót 3 í markamótsskjalinum millum land og kommunur, ið snýr seg um markamótið millum § 14, stk. 2, í løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og § 32 í forsorgarlógini. Støðan hjá Almannaverkinum er, at borgarin hoyrir til serliga bólkin, ið hóast undir 67 ár, kortini eigur at fáa tilboð eftir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. heldur enn § 32 í

forsorgarlógini. Almannaverkið styðjar seg mest til nevndu upplýsingar, ið eru fingnar til vega frá starvsfólk á Landssjúkrahúsinum.

Nevndin hevur eisini fingið skriv frá løgfrøðiliga ráðgevanum hjá Kommunufelagnum umboðandi kommununa, dagfest 4. desember 2019. Kommunan metir øvugt av Almannaverkinum, at borgarin ikki hoyrir undir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Grundgevingarnar hjá kommununi eru serliga, at tað er ikki víst á, at sjúkan hjá borgaranum er progressiv og degenererandi, at talan er ikki um sjúku, ið gomul vanliga fáa, at tað er ikki staðfest, at kognitivu førleikarnir alsamt versna. Eisini verður nevnt, at tað er eingin ábending um, at borgarin hevur demens, alzheimer o.l. sum eru tær kognitivu avmarkingarnar, ið eru viðkomandi sambært viðmerkingunum til § 14, stk. 2.

Umframt upplýsingarnar í nevndu skrivum frá Almannaverkinum og kommununi og upplýsingar frá Landssjúkrahúsinum hevur nevndin eisini fingið tilfar frá teimum avvarandi, ið varð sent Almannaverkinum (skriv dagfest 15. oktober 2019 vegna tey avvarandi).

Í avgerðum í 2016 og 2017 hevur Markamótsnevndin mett um markamótið millum, nær Almannaverkið eftir forsorgarlógini hevur ábyrgd av búplássi og nær ábyrgdin er kommunal eftir lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Nevndin tulkaði tá lógargrundarlagið so, at tey røktarkrevjandi undir 67 ár, ið sum undantak kunnu fáa røktarpláss eftir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., eru borgarar við progressivum og degenererandi sjúkum sum alzheimers og øðrum sløgum av demensi ella sclerosu á seinni stigi. Hetta vóru orðað sum sjúkur, ið eldri menniskju vanliga fáa, og sum tørvsmessiga seta sjúklingarnar, sum eru undir 67 ár, í líknandi støðu sum teir yvir 67. Nevndin skilmarkaði eisini henda bólk mótvegis teimum sjúklingum, sum hava eina stabila ella permanenta støðu, so sum seinheilaskadd, ið sum útgangsstøði eru ábyrgd hjá Almannaverkinum eftir forsorgarlógini.

Avgerðirnar frá 2016 og 2017 ásettu kortini ikki endalig ella víðfevnd kriteriu til tulkingar av markamótinum millum forsorgarlógina § 32 og § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Til tess var lógargrundarlagið ov tunt og avgerðirnar ov fáar.

Tað er rætt, at diabetes 1 er ikki júst tann sjúkan, sum gomul menniskja vanliga fáa. Øvugt er upplýst, at borgarin er ikki í stabilari ella permanentari sjúkulegu, men hevur í mun til heilsuliga høvuðstrupulleikan – fylgjunum av diabetes 1 – ein progredierandi sjúku, ið sambært heilsufakliga serkunnleikanum longu setir hann í som støðu sum røktarkrevjandi, ið eru væl omanfyri 67 ár, og grund er til at halda, at støðan einans fer at at versna heilt til, at hann fær tørv á dialysu.

Í viðmerkingunum til § 5, stk. 4, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt varð undir "Markamót millum bútilboð, veitt sambært hesi lóg, og bútilboð, veitt sambært forsorgarlógini" nevnt, at

"Í heilt serligum føri kunnu borgarar undir 67 ár fáa bústað á røktarheimi ella eldrasambýli. Her verður serliga hugsað um fólk við kroniskum sjúkum s.s. alzheimer, Sclerosu ella aðra neurologiska sjúku, sum viðføra, at tey eru røktarkrevjandi, ella fólk, sum eru doyggjandi, sum ynskja at fáa plass á einum røktarheimi."

Í viðmerkingunum til § 14, stk. 2, var á líknandi sama hátt sagt:

”Ásetingin inniber, at røktarheim ella eldrasambýli í serligum førum kunnu hýsa yngri borgarum, sum eru røktarkrevjandi og sum tørva røkt alt samdøgrið. Tað kann t.d. vera borgari sum fær eina demenssjúku áðrenn pensjónsaldur.”

Lógaruppskotið setti tískil ikki sum treyt, at talan skuldi vera um demenssjúku, alzheimer ella sjúku, ið gomul menniskju vanliga fáa. Sjúkur sum alzheimer, sclerosa ella aðrar neurologiskar sjúkur vórðu tiknar sum dømi um tað, sum *serliga verður hugsað um* í sambandi við, at fólk undir 67 ár gerast *røktarkrevjandi* á ein hátt, sum teimum rætt til pláss eftir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Sum nevndin tulkar lógargrundarlagið, er tað tískil ikki sjúka av ávísum slag ella bara sjúka, sum vanliga rakar eldri menniskju, ið einans kann føra til, at persónur undir 67 ár kemur undir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Heldur er viðkomandi, at ein røð av sjúkum kunnu gera persónar undir 67 ár *røktarkrevjandi* á ein samanlíkniligan hátt við persónar yvir 67 ár, sum eru viknaðir av aldri og aldursrelateraðum sjúkum.

Nevndin heldur ikki, at borgarar undir 67 ár við fylgisjúkum av diabetes vanliga koma undir § 14, stk. 2, í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., men hesin borgarin er eitt serligt føri, sum mest hevur tørv á røkt, ið verður veitt á búplássum undir eldratænastu.

Nevndin metir ikki, at borgarin hevur serstakar pedagogiskar eller aðrar tørvir, ið peika móti tilboði frá Almannaverkinum undir forsorgarlógini, og heldur ikki er upplýst, at hann hevur avbjóðingar ella tørv, ið kunnu leggja serliga byrðu á ella krevja serliga tilbúgving, um hann kemur á stovn undir eldrarøktini.

Niðurstøða

Vísandi til nevndu viðurskifti metir Markamótsnevndin, at borgarin kemur undir ábyrgdarøkið hjá kommununi eftir § 14, stk. 2, í løgtingslóg nr. 19 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Bárður Larsen, formaður

Ása Olsen

Katrin Danielsen